## Mølby sigur nei til danskt felag



Nógvar søgur ganga nú um, hvør skal verða nýggjur venjari hjá FC Nordsjællandi, sum spælir í donsku superliguni. Eitt av nøvnunum, sum hevur verið nevnt, er fyrrverandi stórspælarin í Liverpool, Jan Mølby, men hann kemur neyvan upp á tal.

- Eg ætli mær ikki at verða venjari aftur. Tað er ein avgerð, sum eg og konan hava tikið. Mær dámar væl fótbóltsspælið, men eitt venjarastarv lokkar ikki, sigur Jan Mølby við BT.

Jan Mølby arbeiðir sum viðmerkjari til fótbóltsdystir – bæði á enskum útvarpsstøðum og á danska TV2.

## Start manglar málskjútta

Lokalblaðið Fedrelandsvennen heldur, at Start manglar tann veruliga málslúkin á liðnum. Blaðið skrivar, at fleiri spælarar kunnu gera mál fyri liðið, men at tað trupult at fáa eyga á ein veruligan toppskjútta.

– Start skapar færri kjansir enn áður, men tá ið møguleikarnir eru har, manglar liðið spælarar, sum vilja ofra lív og heilsu fyri at fáa bóltin um málstrikuna, skrivar Fedrelandsvennen.

Blaðið skrivar eisini, at tað skal hugsast um, at møguligir toppskjúttar sum Todi Jónsson og Stefan Barlin hava verið nógv skaddir í ár.




*Ársins flogbóltsspælarar hjá kvinnum og monnum í kappingarárinum 2005/06 vórðu valdir og heiðraðir á gallaveitslu leygarkvøldið*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

# Vágafólk gjørdu um seg til galla

**Vágaliðini standa sterkt í føroyskum flogbólti, og leygarkvøldið settu feløgini seg tungt á heiðurslønirnar til árligu flogbóltsgallaveistluna**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nýggju ferðir vóru spælarar, sum umboða vágafeløgini SÍ og Drátt, rópt upp á gallaveitsluni hjá flogbóltinum leygarkvøldið.

Bestu spælararnir í farna kappingarári vóru kosnir, og vágafólkini sótu tungt á teimum 16 heiðurslønunum, sum vórðu lætnar.

Ársins spælarar hjá bæði kvinnum og monnum koma úr SÍ. Jóan Petur á Stongunum varð valdur til bæði besta verjuspælara og til ársins spælara hjá monnum, og hjá kvinnum var Karin Mikkelsen vald til ársins álopsspælara og ársins spælara.

Tey bæði hava havt týðandi leiklutir á ávíkavist mans- og kvinnuliðnum hjá SÍ, og hóast hesi lið ikki vunnið meistaraheiti í seinasta kappingarári, vóru tey lønt við tí stóra heiðrinum leygarkvøldið.

### Føroyameistararnir heiðraðir

Heiðurslønir vóru lætnar til ársins spælara, áleypara, blokkspælara, verjuspælara, hevara, stjørnuskot, venjara og útlendska spælara. Samanlagt vóru 16 virðislønir lætnar leygarkvøldið.

Fleyr, sum vann meistaraheitið hjá monnum, fekk tvær heiðurslønir. Borcko Ilic varð valdur til besta útlendska spælara, og Sigmundur av Teigum var besti blokkspælari.

Mjølnir, sum endaði næstfremst, fekk tríggjar heiðurslønir, tí Vlado Vasilev varð kostin besti venjari, Bogi Isaksen var besti hevari, og Gunnar Jørgensen gjørdist ársins stjørnuskot.

Hjá kvinnum fingu føroyameistararnir í Drátti tríggjar av ársins spælarum. Ruth Thomasen var stjørnuskotið, Elisabeth Rasmussen ársins venjari, og Nina Alter varð kosin besti útlendski spælarin hjá kvinnum.

Hjørdis Mortensen hjá silvurvinnarunum TB varð vald til besta blokkspælara, og hóast tað ikki gekk nakað serligt hjá Mjølnir-kvinnum í ár, varð Margit Joensen vald til besta verjuspælaran í kappingini í vetur.




*Karin Mikkelsen var vald til ársins spælara hjá kvinnum, og Jóan Petur á Stongunum var valdur til ársins spælara hjá monnum*

### Ársins flogbóltsspælarar 2005/06

**Menn**
Ársins spælari: Jóan Petur á Stongunum, SÍ
Ársins áleypari: Jón Nielsen, SÍ
Ársins blokkspælari: Sigmundur av Teigum, Fleyr
Ársins verjuspælari: Jóan Petur á Stongunum, SÍ
Ársins hevari: Bogi Isaksen, Mjølnir
Ársins stjørnuskot: Gunnar Jørgensen, Mjølnir
Ársins venjari: Vlado Vasilev, Mjølnir
Ársins útlendski spælari: Borko Ilic, Fleyr

**Kvinnur**
Ársins spælari: Karin Mikkelsen, SÍ
Ársins áleypari: Karin Mikkelsen, SÍ
Ársins blokkspælari. Hjørdis Mortensen, TB
Ársins verjuspælari: Margit Joensen, Mjølnir
Ársins hevari: Annika á Stongunum, SÍ
Ársins stjørnuskot: Ruth Thomasen, Dráttur
Ársins venjari: Elisabeth Rasmussen, Dráttur
Ársins útlendski spælari: Nina Alter, Dráttur